# n – men á fyrstu hædd



*Tey, sum manna skrivstovuna hjá Bláa Krossi Føroya í Runavík, eru Kristian á Reynatrøð, fíggjarleiðari, Jaspur Langgaard, aðalskrivari, Tórhild Bjarkhamar, fyribyrgingarleiðari og Kristianna Johannesen, skrivstovukvinna*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Guð eigur æruna fyri at Sjómansheimið er opið

**- Tað er ikki langt síðan, vit sótu her inni við eini torførari uppgávu sum var at royna at fáa Sjómansheimið í gongd aftur, segði Alfred Olsen**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Alfred Olsen, løgtingsmaður, nýtti eisini høvið við móttøkuna hjá Bláa Krossi mikudagin at ynskja felagsskapinum tillukku við nýggju hølunum.

- Tað er ikki langt síðan, at vit sótu her inni. Vit vóru fimm mans - og einsamallir um eina torføra uppgávu, sum var at royna at fáa Sjómansheimið í gongd aftur. Tað sá dapurt út, men hetta eydnaðist nógv betur, enn nakar av okkum hevði droymt um. Nú er Sjómansheimið latið uppaftur og gongur væl – og nú flytir so eisini Blái Krossur Føroya sína skrivstovu undir sama tak.

### Guð æruna

Alfred segði, at tað er Guð, sum eigur æruna fyri, at Sjómansheimið læt uppaftur – og tað er Guð, sum eigur æruna fyri, at Bláí Krossur nú eisini er undir sama taki.

Hann legði dent á, at Bláí Krossur hevur eina stóra uppgávu í okkara fólki, sum hann tók til.

- Ja, hetta er ein veldiga stór uppgáva, og tí er tað ein treyt, at tey, sum starvast her, hava góðar umstøður – og eg vil ynskja teimum hjartaliga tillukku við nýggju hølunum.

### Takkaði

Alfred nýtti eisini høvi at takka familjuni á Glyvrum, sum hevur hýst skrivstovuni hjá felagsskapinum seinastu árini.

- Við at hava skelti standandi á sethúsum sínum, viðurkenna hesi fólk, at tey stuðla eini góðari sak, segði hann.

Hann fegnaðist um, at Hotel Runavík, Sjómansheimið, er rúsfrítt umhvørvi.

- Málið er eitt rúsfrítt land, har fólk seta sítt álit á Guð, segði Alfred Olsen.



*Alfred Olsen sigur, at Guð eigur æruna fyri, at tað gekk so væl at fáa Sjómansheimið í Runavík í gongd aftur. Kári P. Højgaard, varaborgarstjóri í Runavíkar kommunu, sum her lurtar eftir Alfredi, segði eisini nøkur orð við móttøkuna hjá Bláa Krossi mikudagin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# r um dagin í Reykjavík

stovan hjá Bláa Krossi endiliga skal liggja í Eysturoy, tá ið felagsskapurin hevur største virksemið í høvuðsstaðnum.

- Eg haldi, at tað er í lagi, at skrivstovan er í Eysturoy, tí her hava vit 80% av okkara limum, segði aðalskrivarin.

### Kári takkaði

Kári P. Højgaard, varaborgarstjóri í Runavíkar kommunu, takkaði vegna býráðið Bláa Krossi Føroya fyri tað arbeiða, sum felagsskapurin ger.

– Vit eru ógvuliga fegin um tað virksemið, sum Bláí Krossur hevur – og ikki minst fyri tey fyribyrgjandi átøkini.

Hann helt, at felagsskapurin fær nógv burtur úr fyri tann pening, sum er at ráða yvir.

- Bláí Krossur Føroya hevur stóra virðing í fólkinum, segði varaborgarstjórin.

### Rúsfrítt umhvørvi

Leiðarin á Hotel Runavík, Sjómansheiminum, Andreas Andreasen, ynskti Bláa Krossi vælkomnum undir lonina.

Hann helt fyri, at vinningurin við ikki at hava útskeinking er nógv størri enn "vansin" – um man so kann siga.

- Matstovur, sum hava útskeinking, lata aftur í heilum, og mær er sagt, at heili 365 vertshús lótu aftur í Reykjavík í 2004 – ella eitt um dagin hvønn dag í árinum!

Andreas Andreasen helt ikki, at tað er "trend" longur at drekka.

- Hinvegin er tað "trend" at drekka reint vatn við krystallklárum ísterningum, sum hann tók til.

Leiðarin segði seg fegnast um at skula arbeiða undir sama taki sum Bláí Krossur, og hann ynskti felagsskapinum hjartaliga tillukku – og vælkomnum á fyrstu hædd á Hotel Runavík, Sjómansheiminum.